# ítróttur

Nr. 225 • mikudagur • 21. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Formansstríðið er byrjað



*Valstríðið í FSF tykist av álvara at vera komið ígongd, men trupult er tó at fáa staðfest, hvussu stórir møguleikarnir hjá ymsu valaevnunum eru at gerast eftirmenn hjá Torleifi Sigurðsson*

**Nú formaðurin seinastu 20 árini fer at mynstra av, er spurningurin, hvør skal loysa skiparan á føroysku fótbóltsskútuni av**

FÓTBÓLTSPOLITIKKUR
*Jákup Mørk*

Hóast fólkatingsval var á skránni í gjár, so er tað tó ikki bert á hesum pallinum, at politikkur verður førdur. Politikkur er jú so øgiliga nógv annað enn tvey føroysk umboð á Christiansborg, og mitt í øllum meldrinum er eisini nakað, sum verður rópt fótbóltspolitikkur.

## Nýggjur formaður skal finnast

Støðan í Fótbóltssambandinum er nevnliga tann, at á komandi aðalfundinum, sum verður hildin í antin januar ella februar, skal ein nýggjur formaður veljast. Skiparin seinastu mongu árini, Torleif Sigurðsson, hevur boðað frá, at hann nú mynstrar av.

Síðani tíðindini um hetta bórust, hevur nógv verið tosað og gitt um, hvør skal verða eftirmaðurin hjá Torleifi Sigurðsson. Nógvar leysasøgur hava ferðast kring landið, og meðan onkrar hava verið at kalla døgnflugur, hava aðrar verið meira seiglívaðar. Tað hava tó serliga verið trý nøvn, sum alla tíðina hava gingið aftur í hesum. Nevnliga nevndarlimurin í FSF, Dánjal Andreasen, aðalskrivarin, Ísak Mikladal og Christian Andreasen, sum í løtuni er limur í sáttmálanevndini hjá Fótbóltssambandinum.

## Valevnið hjá FSF

Hóast tað enn ikki hevur verið nøkur formlig viðgerð av formansvalinum í FSF, so hevur tað leingi ljóðað, at teirra uppskot til ein nýggjan formann verður Dánjal Andreasen úr Leirvík.

Dánjal hevur ígjøgnum nógv ár verið virkin í FSF, og at hann í dag verður roknaður sum ein av álitismonnunum speglast eisini aftur í, at hann í dag situr í nevndini hjá sambandinum, umframt at hann eisini er í fíggjarnevndini, landsliðsnevndini og lógarnevndini.

Sjálvur vil leirvíkingurin tó gera so øgiliga nógvar viðmerkingar til spurningin, um hann er ein av høvuðskandidatunum til valið.

- Hatta er ein spurningur, sum als ikki hevur verið til viðgerðar enn, so tað fái eg ikki sagt nakað um. Sjálvur havi eg so onga áheitan fingið um hetta, men sjálvsagt er tað nakað, sum eg vildi umhugsað, um ein slík skuldi komið.

## Norðan

Heldur ikki aðalskrivarin í FSF, Ísak Mikladal, sigur seg hava fingið nakra áheitan um at stilla upp til formansvalið.

Tað hevur annars ljóðað, at ein bólkur av feløgum í Eysturoynni saman við KÍ ætla at ganga saman um aðalskrivaran, men tað hevur so ikki eydnast okkum at fáa hesi tíðindi váttað.

Sjálvur sigur Ísak Mikladal, at hetta eru tíðindi, sum hann einki veit um.

- Tað er so einki felag ella nakar bólkur av feløgum, sum hevur vent sær tíl mín við eini áheitan um at stilla upp. Tí havi eg heldur ikki tikið nakra støðu til, um eg hevði eftirlíka einari tílíkari áheitan, men tað er sjálvsagt nakað, sum eg vildi umhugsað.

## Suðureftir

Eftir er so Christian Andreasen, sum dagliga starvast sum advokatur, men sum leingi hevur verið aktivur á ymsum postum í FSF, og sum í løtuni situr í sáttmálanevndini.

Tað hevur ljóðað, at tey bæði stóru havnarfeløgini hava gjørt samgongu við suðuroyarfeløgini um hetta valevnið, og at arbeitt verður eisini við at fáa Vágoynna við í hendan bólkin.

Í mun til teir báðar oman fyri nevndu, so váttar Christian Andreasen, at okkurt tos hevur verið.

- Tað er rætt, at eg havi fingið onkra óformliga áheitan, men enn havi eg als ikki tikið støðu til, um eg fari at stilla upp, gerst talan um eina formliga áheitan.

- Tað veldst jú um so nógv, tí talan er um eina stóra uppgávu, og eg haldi meg ikki hava ov lítið at gera í gerandisdegnum, sigur Christian Andreasen.

## Ikki Heðin

Annars hevur eisini ljóðað, at ÍSF forsetin, Heðin Mortensen, skal hava víst sessinum áhuga. Okkurt graml hevur verið frammi um, at hann enntá skal vera til reiðar at siga ÍSF-sessin frá sær, um hann kundi verið valdur í FSF, men hesum avsannar Heðin avgjørdur.

- Eg havi so onga áheitan fingið av nøkrum slag, og eg rokni so avgjørt ikki við, at eg hevði stillað upp kortini.

- At eg skal vera til reiðar at siga ÍSF-sessi frá mær, eru helst bara leysatíðindi av onkrum slag ,tí tað havi eg so ongar ætlanir um, sigur Heðin Mortensen um hetta.

Sostatt er líkt til, at talan í fyrsta umfarinum verður um teir tríggjar fyrstnevndu kanditdatarnar, men fyri tað er ikki víst, at allir tríggir stilla upp. Millum annað veldst hetta helst eisini um tann uppbakning, sum teir møguliga kunnu fáa, og hóast eingin vil siga tað, so er eingin loyna, at feløgini so spakuliga eru farin at reka til valið. Enn er tó eitt fitt pettið, til gongan er komin í rætt, og ikki fyrr enn tá fæst endaligt at vita, hvør nýggi fótbólts-bossurin í Føroyum verður.



# TB riggar til

**Aldursforsetin í føroyskum fótbólti er longu komin væl áleiðis í fyrireikingunum til komandi kappingarárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani teir í 1987 gjørdist føroyameistarar í fótbólti fyri sjeyndu ferð, hevur tilveran hjá TB í bestu mansdeildini verið heldur skiftandi.

Longu árið eftir varð fyrsta niðurflytingin veruleiki, og síðani hevur liðið við skiftandi eydnu roynt at fingið fastatøkur á bestu deildini.

Seinasta royndin í so máta – í 1999 – gav einki úrslit. Felagið endaði niðast í deildini, men eftir at teir nú aftur hava tryggjað sær sess í fyrstu deild, tykjast tvøråmenn at leggja nógv fyri í fyrireikingunum til komandi árið.

Venjarin, sum at enda stóð við róðrið í fjør, Zoran Mancic, hevur gjørt avtalu um at halda fram, men hann verður so langt ífrá einasti útlendski leikarin á liðnum.

Zoran er í løtuni heima í Jugoslavia í vetrarfrí, og her hevur hann nýtt høvið til at fáa tveir av landsmonnum sínum at koma við sær, tá leiðin um nakrar mánaðir gongur aftur til Føroyar.

Vit hava fingið upplýst, at talan er um tveir verjuleikarar, harav annar hevur roynt seg í fremstu jugoslavisku deildini.

Eisini hava tvørámenn gjørt avtalu við Sasha Radosavljevic um at halda fram. Vandamikli álopsmaðurin var í 1997-1999 at síggja hjá ávíkavíst TB og GÍ, og í seinnu hálvu var hann brádliga aftur at síggja á TB-liðnuim, sum við hesum fekk kanska avgerandi trumfin í oddastríðnum í aðru deild.

## Eisini lokalt

Tað ljóðar eisini av Tvøroyri, at umframt útlendska styrkin, so roynir felagið eisini at fáa onkrar av lokalu leikarunum í Suðuroynni knýttar at felagnum.

Mest upplagda navnið her er sjálvandi Tórður Holm, sum seinnu árini hevur spælt við VB, men tað er eingin loyna, at eisini hini suðuroyarfeløgini hava leikarar, sum kundi styrkt um møguleikarnar hjá TB at halda seg í bestu deildini.

Umframt hesar leikarar, so eiga tvørámenn eisini fleiri evnaríkar leikarar, men felags fyri nógvar av heum er, at teir enn mugu roknast sum ov ungir til at átaka sær nakran berandi leiklut í bestu deildini. Megnar TB at halda fast um hesar, soleiðis at teir saman við leikarum uttan ífrá kunnu halda liðnum uppi, er kanska ikki óhugsandi, at TB aftur í framtíðini kemur at hava eitt orð at siga í føroyska fótbóltsoddinum.

Hóast hetta er ein styrkur hjá Neistanum, so telur tað øvugta vegin, at Heini Joensen ikki er tøkur mikukvøldið. Hann fekk reyða kortið í seinasta dystinum hjá Neistanum, og er tískil leikbannaður hesaferð.

# Hondbóltur á Skála

**Bæði hjá kvinnum og monnum skulu StÍF og Neistin dystast mikukvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í kvøld, mikukvøldið, verða tveir hondbóltsdystir leiktir í Ítróttahøllini á Skála.

Upprunaliga skuldu teir báðir dystirnir millum StÍF og Neistan verði leiktir týskvøldið, men orsakað av fólkatingsvalinum varð hetta broytt.

## Tykist spennandi

Hjá kvinnunum er einki at ivast í, at Neistin er greiður favorittur, tá tær fara á vøllin. Høvuðsstaðarliðið hevur aftur í ár víst, at tær vilja vera við í stríðnum um heiðursmerki, og hóast StÍF tykist vera um at koma fyri seg, so skuldi styrkin hjá Neistanum verið ov stór til uppflytararnar.

Hjá monnunum tykist spenningurin undan dystinum at vera væl størri. Tá liðini hittust í Havn til fyrsta dystin á árinum, eydnaðist Neistanum at vinna við einum máli.

Síðani tá eru tó onkrar broytingar farnar fram á báðum liðum. Strandingar eru nú lidnir at hugsa um fótbólt, og kunnu tí leggja meira í hondbóltsvenjingina, og helst fer hetta eisini at geva úrslit á vøllinum.

Hjá Neistanum hava teir síðaini fyrsta dystin fingið tilgongd av John Petersen, og hetta verður soleiðis fyrsta ferðin, at hann skal royna seg móti fyrrverandi liðfeløgunum.

Hóast hetta er ein styrkur hjá Neistanum, so telur tað øvugta vegin, at Heini Joensen ikki er tøkur mikuvøldið. Hann fekk reyða kortið í seinasta dystinum hjá Neistanum, og er tískil leikbannaður hesaferð.

# Føroyar við til EM í bridge

**FBS hevur nú avgjørt at senda eitt landslið til EM í bridge. EM kappingin verður komandi summar í Salomaggiore í Italia. FBS arbeiðir í løtuni við at savna ein landsliðshóp og at finna venjara til liðið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Avgerðin um at fara við til EM, má sigast vera ein stórhending í føroyskum bridge høpi. Hetta verður fyrstu ferð, at vit føroyingar taka lut í hesari kappingini. Higartil hava vit bara spælt við í NM kappingunum.

## EBL Simultan

Tann europeiska simultan kappingin verður spæld komandi viku. Her í Føroyum verður spælt mánakvøldið 26. november í Havn og í Fuglafirði og mikukvøldið 28. november í Klaksvík. Bæði kvøldini verður byrjað at spæla kl 19.00.

Ein simultan kapping er ein kapping, har øll spæla somu kort sama dag ymsa staðni — í hesum førinum í Europa. Tá øll úrslitini eru savnað saman og gjørt er upp, kunnu vit fara inn á internetið og síggja úrslitini. Heimasíðan hjá Havnar Bridgefelag: www.bridge.fo leggur eina slóð út til heimasíðuna hjá EBL, har úrslitini verða at síggja.

Átekning til kappingina er á staðnum.

**Eitt gott mótspæl**

| | | |
|---|---|---|
| E/- | Sp 532<br>Hj QJ107<br>Rú QJ42<br>Kl Q7 | |
| Sp KQ76<br>Hj K6<br>Rú A103<br>Kl A632 | | Sp 84<br>Hj A9843<br>Rú K97<br>Kl KJ9 |
| | Sp AJ109<br>Hj 52<br>Rú 865<br>Kl 10854 | |

**NS:** Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen
**EV:** Henriette Svenstrup — Jóna Grunnveit

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | - | 1hj | pass |
| 1sp | pass | 1ut | pass |
| 3ut | pass | pass | pass |

**Útspæl:** rú 8

Spælið er frá dystinum millum Junior Busstaxa og Jónu Grunnveit í 1.deild 3. november í Bridgehúsinum.

Rói valdi at spæla rútara út. Um hann hevði spælt spaðara út, hevði spælførarin lættliga tikið 9 stikk. Borðið legði rú 3, Norðan rú Q, og spælførarin tók við konginum. Hjartari varð spældur til kongin, og síðan lítil kleyvari frá borðinum til dreingin. Spælførarin tók nú hj A og spældi enn ein hjartara — Sunnan og borðið kastaðu spaðara, og Norðan fekk stikkið við dreinginum. Spaðari frá Norðan, sum borðið slapp at eiga við frúnni.

Spælførarin royndi nú, um kleyvarin sat 3-3. Men tað gjørdi ikki, og Sunnan kom inn uppá tann fjórða kleyvaran. Hann spældi so rútara, og spælførarin skuldi gita, hvør hevði rú J. Lítil rútari frá borðinum, Norðan fekk fyri dreingin, tók fyri hj Q og spældi spaðara til essið hjá makkaranum. Kontraktin fór soleiðus ein niður.

Kontraktin kann altíð vinnast, um spælførarin spælir uppá, at sp A er hjá Sunnan, men her gjørdi mótspælið tað trupult fyri spælføraran.

At enda skulu vit minna á, at tað er opið hús í Bridgehúsinum hvønn sunnudag kl 14.00!



*Nývaldi formaðurin í Bridge-sambandinum, Mortan Rasmussen, arbeiðir í løtuni við fyrireikingunum til at senda føroyskt landslið til komandi EM-kappingina*